## Flutningsstuðul brúkast til tað hann var ætlaður til

FLUTNINGS-STUÐUL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ætlanin er nú at broyta lógina um flutningsstuðul.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur, at hereftir skal flutningsstuðulin bara brúkast til tað, sum hann var ætlaður tilnevniliga at stuðla virkjum kring landið i at keypa fisk.

Flutningstuðulin hevur verið 3,5 milliónir um árið, men í ár lækkaði hann niður í 2,5 milliónir. Og tað er ætlanin, at hann skal vera 2,5 milliónir aftur næsta ár.

Men hóast talan er um eina lítla upphædd, hevur hann verið nógv umstríddur. Tey eru mong, sum halda, at hann skal takast av, tí hann avlagar kappingina og tí at vinnulívið eigur ikki at fáa studning.

Hinvegin halda onnur at hann er kappingaravlagandi, tí tað er nógv dýrari hjá vikjum í útjaðaranum at keypa fisk, tí tað kostar so nógv at flyta hann ímillum uppboðssølu til virkini í útjaðaranum.

Men Jacob Vestergaard ger greitt, at ætlanin er ikki at taka hann av og at landsstýrið hevur aftur í ár sett 2,5 milliónir av til endamálið.

Flutningsstuðul verður latin virkjum t il at keypa fisk, har firðir og sund skilja.

Men higartil hevur tað verið so, at hann hevur virkað báðar vegir, tvs, at virki í miðstaðarøkinum hava eisini fingið stuðul, tá ið tey hava keypt fisk, har firðir og sund skilja.

Men nú skal lógin broytast, so at hann lýkur upprunaliga endamálinum. So hereftir verða tað bara virki í útjaðaranum, sum fáa stuðul til at keypa fisk, har firðir og sund skilja.

Spurningurin er nú, hvussu verður við virkjum í Vágum, nú undirsjóvartunnilin er komin?

# Inntøkutrygdin hjá fiskimonnum skerjast

**– Ætlanin er at skerja summar partar av inntøkutrygdini hjá Fiskimonnum komandi ár, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður**

INNTØKUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Næsta ár er ætlanin at skerja inntøkutrygdina hjá fiskimonnum nokk so fitt.

Tað sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Sostatt váttar hann ta niðurstøðuna, sum vinnunevndin hjá Løgtinginum er komin til, nú hon gjøgnumgongur uppskotið til fíggjarlógina fyri í ár.

Í ár eru 20 milliónir settar av til inntøkutrygd hjá fiskimonnum. Men tann játtanin heldur ikki, so neyðugt verður við eini eykajáttan upp á 8 milliónir afturat, so at samlaða játtanin í ár kemur upp á 28 milliónir.

Men næsta ár er ætlanin at skerja játtanina og eftir ætlanini hjá samgonguni, verða bara 16 milliónir skulu setast av til inntøkutrygdina næsta ár, ella 12 milliónie minni, enn brúktar verða í ár.

Í viðmerkingum sínum til fíggjarlógina, sigur vinnunevndin, at Landsstýrið hevur boðað frá, at hetta skal takast innaftur við lógarbroytingum.

– Hetta fer at føra við sær munandi skerjingar í inntøkunum hjá hesum vinnubólki, staðfestir vinnunevndin.

### Skjótari úr skipanini

Og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásannar nú, at skerjingar skulu gerast.

Akkurát, hvussu hetta skal gerast, veit hann kortini ikki rættiliga enn, men arbeitt verður við tí.

Tó sigur hann, at ein rættiliga stór útreiðsla í sambandi við inntøkutrygdina, er játtanin til minstaforvinning til útróðrarmenn.

Í vár varð ein roynd gjørd at minka um útreiðslurnar til minstaforvinning til útróðrarmenn, men tað fall.



*– Tað er hugvekjandi, at tað vera brúktar 10 milliónir um árið til minstaforvinning til útróðrarmenn í eini tíð, har útróðurin er serliga góður, heldur Jacob Vestergard, sum her er og hyggur eftir seyði í seyðhúsinum á Økrum*

Tað er ein orsøk til, at játtanin ikki heldur.

Men nú er aftur ætlanin at broyta lógina, so at minstiforvinningurin fyri so vítt hækkar, men at útróðrarmenn hinvegin skulu detta skjótari úr aftur skipanini, tá ið teir ikki rógva út.

Uppskot um hetta er gjørt og verður lagt fyri løgtingið ein av fyrst komandi døgunum.

Jacob Vestergaard heldur, at tað er løgið at hugsa sær, at útreiðslurnar til minstaforvinning hava verið einar 10 milliónir um árið í eini tíð, har útróðurin hevur verið serliga góður.

Annars verður eisini hugt eftir bæði minstulønini og dagstudninginum, men um nakrar broytingar verða gjørdar á tí økinum, veit landstýrismanninum ikki.

Hinvegin vísir hann á, at tað eru rættiliga fáir fiskimenn, sum sigla fyri minstuløn.

# Allur ivi skal beinast burtur

**Ì løtuni eru løgfrøðingar í ferð við at gjøgnumganga alla fiskivinnulóggávuna fyri at beina allar ivar burtur**

FLØKT LÓG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fáir landsstýrismenn hava havt tað so trupult av sínum lógarverki, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

Ferð eftir ferð hevur ivi tikið seg upp um, hvussu hetta og hitt í lógini skal skiljast, tulkast og praktiserast- og tað hevur meiri enn einaferð ført til, at politiska støðan hevur verið spentari enn gott er.

Harumframt hevur tað eisini ført við sær at tað hevur tikið órímiliga drúgva tíð at avgreiða ymsar umsóknir og fyrispurningar

– At lógin manga staðni er so ógreið ger mannagongdirnar ov stirvnar, umframt at umsitingin verður óneyuga dýr, tí Fiskimálaráðið má ofta keypa sær rágeving úti í býnum tá ið ivamál stinga seg upp, sigur Jacob Vestergaard.

Og hetta hevur hann nú tikið til eftirtektar.

Tí hevur hann sett eina nevnd at gjøgnumganga alla fiskivinnulóggávuna, sum hon er.

### Hevði verið eitt kvetti

Hetta arbeiðið er sprottið burturúr einum lógaruppskoti hjá Henrik Old, løgtingsmanni, sum skeyt upp at gjøgnumganga fiskivinnulóggávuna.

Í meðan tingið viðgjørdi uppskotið varð tað broytt og tað endaði við, at ein lógarteknisk gjøgnumgongd av fiskivinnulóggávuni skuldi gerast.

Og tað hevur Jacob Vestergaard sett í verk og í løtuni sita tveir privatir løgfrøðingar og gjøgnumganga alla lógina.

– Tað er onki yvir at dylja at vit hava eina ógvuliga fløkta lóggávu so tað hevði verið eitt kvetti at fingið eina djúptøkna gjøgnumgongd av øllum lógarverkinum, sigur landsstýrismaðurin.



*Fiskivinnulóggávan er ógvuliga fløkt og tað hevur elvt til nógv stríð og nógvar ósemjur. Tí hevði tað verið ógvuliga hent at fingið alla lógina endavendað, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður*

Hann sigur, at endamálið við hesum arbeiðnum er at finna øll tey støðini í ymsum fiskivinnulógum, sum eru í stríð við hvørja aðra fyri at lúka slíkt burtur og fyri at fáa tað púra greitt, hvussu tey ymsu brotini skulu skiljast og at savna tað saman, har ein grein í logini vísir til eina aðra, sum aftur vísir til eina aðra o.s.fr.

Eydnast hetta, skuldi tað gjørt lógina munandi lættari at skilt og at arbeitt við yvirhøvur.

Landsstýrismaðurin sigur, at av tí at talan skal vera um eina gjøgnumgongd, slepst ikki undan at taka nøkur prinsipiell ivamál upp til politiska viðgerð.

So er spurningurin, hvussu langt tey koma við tí.

– Av tí at talan er um okkara høvuðsvinnu, hevði hann viljað, at tað bar til at fáa ein stóran part av løgtinginum, at tikið undir við, hvussu fiskivinnulógin skal skipast og umsitast. Og tað fer hann at royna, hóast royndirnar við breiðum semjum higartil ikki hava verið nakað serligar.

Og hann vónar, at tað fer at bera til at leggja eina dagførda lóggávu fyri tingið í hesi tingsetuni, sum altso endar á Óalvsøku.

– Eydnast tað, kann tað gera stóran mun í royndunum at reinsa tað politisku luftina, sigur Jacob Vestergaard.



# Vil seta í lóg at alt á einum fiski skal takast við til lands



*JacobVestergaard hevur onnur áhugamál enn fisk. Hansara stóra frítíðarítriv er seyður og hetta kvøldið, vit hittu hann, var hann komin suður at gera brund kláran. Og her er hann so við honum, sum skal føra ættina víðari. Brundurin fekk 1. virðisløn á seyðasýning, so dugur skuldi verið í honum.*

**– Tað er ikki rætt at blaka livur og innvølir fyri borð, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

HJÁVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað eigur at verða sett í lógina, at alt a einum fiski skal takast við til lands og at onki skal tveitast fyri borð, hvørki livur ella aðrir innvølir.

Tað heldur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Hann er fullvísur í, at skal tað eydnast okkum at virðisøkja tann fiskin meiri, sum vit fiska, skal nýhugsan til.

– Tað er greitt, at okkara fiskatilfeingi er avmarkað í nøgd og vit fáa ikki økt inntøkurnar til samfelagið við at fiska meir. Tað er heldur ikki sannlíkt, at fiskaprísirnir á vanligum vørum fara stórvegis upp og vit kunnu heldur ikki vænta, at vit fara at fáa meiri fyri tær vanligu fiskavørurnar.

– Sostatt er tað eisini sannlíkt, at møguleikarnir í vanligu fiskivinnuni eru at kalla úttømdir.

– Tey framstig, vit skulu gera, kunnu vit sostatt at kalla bara gera við at fáa so góða rávørur sum gjørligt til lands og at fáa so nógv burturúr hesi rávøruni, sum tilber.

### Meiri burturúr hjávinnum

Jacob Vestergaard sigur, at skulu vit tískil gera okkum vónir um at fáa munandi meiri fyri okkara útflutning av fiski, verður tað neyðugt at hugsa óvanligar tankar.

Og ein sjálvsagdur møguleiki kundi verið at fingið meiri burturúr tí partinum á fiskinum, sum í dag at kalla slett ikki verður gagnnýttur nakað serligt, eitt nú livur, innvølir, ryggir og slógv annars.

Hann vísir á, at tað eru tankar frammi í Føroyum um at fara undir virki, sum skal gagnnýta tær hjáframleiðslur ið kunnu fáast burturúr tí partinum av fiskinum, sum vit annars onki fáa burturúr.

Hann sipar til ætlanina hjá Faroe Marine Biotech at fara undir slíka framleiðslu.

Og hetta heldur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, er rætta leiðin at ganga.

Men skal ein slík vinna hava livilíkindi, er tað eisini neyðugt at hon fær rávøru.

Og skal hon hava rávøru, er tað sostatt eisini neyðugt, at fiskimenn taka livur og innvølir við sær til havs, heldur enn at tveita tað fyri borð og at virkini eru sinnað at savna ryggir, høvd og slógv annars.

Hann heldur, at skal tað eydnast, er neyðugt við eini hugburðsbroyting hjá okkara fiskimonnum, so at teir eisini fara at hugsa um livur og innvølir sum eina rávøru, sum pengar eru í. Tað sama er fyri so vítt eisini galdandi fyri virkini á landi.

Ein annar møguleiki kann vera at føra fiskin ókruvdan til lands, í hvussu so er ein part av honum, eitt nú útróðrarfisk, men kanska annan fisk eisini.

### Ásetast við lóg

Men Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum heldur avgjørt eisini, at sum frálíður er tað rætt, at fáa tað við í sjálva lógina, at alt skal førast til lands.

Hann sigur, at tað verður neyvan enn, at tað verður gjørt, men sum fálíður eigur tað at verða gjørt.

Hann leggur kortini afturat, at tað ber illa at krevja, at livur og innvølir verða tikin til lands, er ikki onkur, sum er sinnaður at keypa tað og at betala prís fyri tað.

– Men tá ið keyparin er, eigur tað eisini at fáast til høldar og tá er tað rættasta eisini at seta tað beinleiðis í lógina, sigur hann.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum sigur, at tá ið ein skip avreiðir, er tað skjótt at rokna út, hvussu stór vekt av innvølum eigur at fylgja við til lands eftir tí, sum skipið hevur fiskað, tí talan er um ein ávisan part av vektini á hvørjum fiski.

Í Íslandi hava tey ta skipan, at har verða skip revsað, sum ikki taka innvølir við til lands

So vítt, sum landsstýrismaðurin veit, skulu tey skip, sum tveita innvølir fyri borð, betala avgjald, sum tey, ið taka alt til lands, sleppa undan.

– Men um tað er ein gongd leið í Føroyum, veit eg ikki, sigur Jacob Vestergaard.

Hann heldur, at tað skal gerast so lagaligt sum gjørligt. Kunsturin verður at gera tað so áhugavert hjá fiskimonnum at taka alt til høldar, tí at tað loysir seg.

Hann sigur eisini. at hetta er neyvan nakað, sum letur seg gera í einum, men í longdini eigur tað avgjørt at vera okkara endamál, at alt skal til lands og tað heldur landsstýrismaðurin, eigur at standa í lógini.

### Politiskur vilji

Yvirhøvur tykist tað sum um, at politiskur vilji er til at seta rættiliga gongd á arbeiðið at fáa meiri burtur úr tí partinum av fiskinum, sum lítið og onki verður gagnnýttur, sum er.

Nú uppskotið til fíggjarlóg er til viðgerðar, heldur vinnunevndin at tað hava skund at seta eitt arbeiði í gongd fyri at skapa neyðugu karmarnar og fortreytirnar soleiðis, at vinnan í størst møguligan mun kann troyta inntøku- og menningarmøguleikarnar við størri hjáframleiðslu.

Jacob Vestergaard sigur, at hetta er serliga áhugavert, nú tað tykist sum um at kappingarførið hjá føroysku fiskavirkjunum er versnað og at tað fer at versna enn meiri komandu árini.

– Nú er støðan tann, at tað loysir seg hjá fiskivinnuni í Noregi, at føra fisk heilt til Kina, fáa hann virkaðan har fyri síðani at senda hann aftur til Evropa.

– Í Føroyum hava vit nógv vælútbúgvið fólk og alla vitanina vit hava, eiga vit at gagnnýta, so at vit fáa meiri burturúr fiskatilfeinginum, sum vit hava og sum ikki verður gagnnýtt í løtuni. Og eg haldi ikki, at tað er rætt at tveita ein heilt fittan part av okkara fiskatilfeingi aftur í havið.

Kortini heldur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, at tað er avmarkað, hvat tað almenna kann gera fyri at skumpa undir nýhugsan á hesum øki.

– Tað almenna kann lata stuðul nýggjar vinnur, men játtanin er avmarkað, so talan er í øllum førum ikki um tað stóra.

Í hesum sambandi kann skoytast uppí, at av hvørjum fiski, vit fiska, eru heilar 2/3 burturkast, tí groft sagt brúka vit bara fløkini. Men alt, sum eitur slógv, tað eru høvdini, ryggirnir og allur innvølirnir, verða at kalla onki brúkt.

Egil Olsen, sum er stjóri í Faroe Marina Biotech, hevur áður upplýst fyri Sosialinum, at verður hesin parturin av fiskinum, sum nú er burturkast, eisini gagnnýttur til fulnar, kunnu vit økja okkara útflutningsvirðið í fiskivinnuni einar 500 milliónir krónur um árið.